# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# OKKUM TØRVAR BREIÐU SEMJUNA

Danskir politikarar, donsk embætisfólk og danskir miðlarnir hava ikki tikið væl ímóti uppskotinum um stjórnarskipan Føroya, sum er úrslit av arbeiðinum hjá stjórnarskipanarnevndin. Síðsta hóttanin kom frá forsætismálaráðharranum, sum á føroyavitjanini segði, at um Løgtingið samtykkir uppskotið í verandi líki, so eru føroyingar byrjaðir upp á loysingina.

Hetta sigur forsætismálaráðharrin, tí at løgfrøðingar í løgmálaráðnum danska hava tulkað uppskotið frá stjórnarskipanarnevndini soleiðis, at føroyingar vilja hava loysing inn gjøgnum bakdyrnar.

Tað var í 1906, at vit fingu floksbýtið á tingi. Og floksbýtið gekk bara út upp á at bólka tingmenn fyri ella ímóti Danmark: Sambandsmenn og Sjálvstýrismenn. Ein rættiliga heimføðisligur háttur at dríva politikk uppá, kunnu vit siga. Og somuleiðis mugu vit við skomm siga, at vit eru ikki komin serliga nógv longur í so máta enn.

Á sama hátt sum Andrass Samuelsen og Jóannes Patursson stríddust, stríðast vit framvegis um ríkisrættarligu støðu Føroya. Kortini eru vit kanska ikki so ósamd kortini, tí við uppskotinum frá stjórnarskipanarnevndin hómast ein semja, eitt konsensus millum føroyskar politikarar um, hvussu vit skulu definera okkum sum land og sum tjóð - uttan at hetta skal vera eitt uppskot um at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum við Danmark. Tað blíðkar fyri hugaðum monnum.

Tí er tað so stórt spell, at tað ikki eisini skal blíðka fyri hugaðum dønum. Tað er stórt spell, at forsætismálaráðharrin - sum betur enn nakar annar danskur politikari eigur at skilja føroyskan politikk - eisini skal fella í hesa grøvina, sum sjálvt skilagóð og pragmatiskt fólk á bæði sambands og tjóðveldisveinginum skilja: At tað er neyðugt at fáa eina tvørpolitiska semju um stjórnarskipan okkara og eina semju við, hvussu vit skipa okkum sum tjóð, bæði innan fyri danska ríkið og uttanfyri - um vit einaferð skuldu



valt tað.

At billa sær inn, at Føroya Løgting ætlar at sníka eina loysing inn gjøgnum bakdyrnar við hesum uppskotinum er simpulthen ov býtt. Tað er ikki klókt av forsætisráðharranum at siga slíkt.

Um tað er nakað, sum føroyingar eru so nøkulunda samdir um, so er tað, at vit ikki vilja hava loysing. Um føroyingar vildu havt loysing, so høvdu loysingarflokkarnir havt meirilutan á tingi.

Stundin er komin til at gevast við hesum stríði, sum fyllir alt ov nógv í politisku skipanini. Tí er ein semja um stjórnarskipanina kærkomin, og kann politiska skipanin konsentrera seg um at reka politikk, so er nógv vunnið.

**» Ein politisk semja um stjórnarskipanin er í ljósmála**

# Bakkafrost 109 milliónir í avlopi fyrra hálvár



Fríggjadagin legði Bakkafrost fram roknskapin í Oslo. Roknskapurin vísir, at rakstrarúrslitið hjá Bakkafrost fyri fyrra hálvár 2010 var 109 milliónir danskar krónur ímóti 91 milliónum sama tíðarskeið í fjør. Nettoúrslitið eftir skatt er 78,8 milliónir krónur ímóti 57,4 sama tíðarskeið ífjør. Biologiska gongdin er framhaldandi góð, og marknaðurin er sera góður.

- Bakkafrost hevur í fyrra hálvári eina framgongd, hóast selda mongdin er lækkað. Tað er serstakliga at fegnast um, at avlopið fyri hvørt selt kilo er hækkað. Vit hava góðar vónir fyri restina av árinum. Samanlagt er ætlanin at taka eini 24.000 tons av laksi í ár, sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost.

Hann sigur víðari, at sølan hevur í fyrra hálvári 2010 verið íalt 390 milliónir krónur samanborið við 277 mió kr fyrra hálvár 2009. Mongdin er 28% lægri fyrra hálvár 2010 enn sama tíðarskeið ífjør, men prísurin hevur verið væl hægri. Samanlagt vóru 5.341 tons tikin í øðrum ársfjóðringi 2010 samanbori við 7.406 tons í sama tíðarskeiði 2009. Samlaða selda mongdin fyrra hálvár 2010 er sostatt 11.085 tons

Parturin av laksi, sum er víðarivirkaður til lidnar vørur hevur í øðrum ársfjóðringi verið 67%, hetta er heldur hægri partur enn vanligt, eftirsum samlaða mongdin av laksi hjá samtakinum hevur verið lægri enn vanligt. Tað verður mett at hesin partur verður nakað lægri í seinna hálvári.

## Fakta

Bakkafrost er størsta alifelag í Føroyum við eini framleiðslu upp á 30.650 tons av laksi í 2009 (kruvd vekt). Felagið er fult integrerað frá smolti til lidnar vørur og sølu. Felagið rekur 14 aliøki á 13 ymiskum firðum og eigir 44% av aliloyvunum í Føroyum. Felagið hevur kryvjivirki í Klaksvík og Kollafirði og framleiðslu av lidnum vørum á Glyvrum. Høvuðsskrivstova felagsins er á Glyvrum, og felagið hevur 480 starvsfólk.



**» Mentanarligt margfeldi í Nólsoy**

MARIN KATRINA FRÝDAL
KJAK Á SÍÐU 14



**» Undskyld jeg er færing**

JOSEFINA SMITH
KJAK Á SÍÐU 13



# Rás2 hoyrist nú í Sandvík

Seinastu tíðina hava fólk varnast, at mastrar eru komnar at standa í fjallinum norðan fyri Sandvík.

Nú vísir tað seg, at hetta eru sendarar, sum gera, at nú ber eisini til hjá sandvíkingum at hoyra Rás2.

Og leygardaagin varð sendarin settur til, so tá ið sandvíkingar nú stilla radiotólið inn á FM 104,3 ljómar Rás2 so lystiliga úr hátalaranum.

Jonhard Hammer, stjóri á Rás2, fegnast um, at eitt pláss afturat nú er knýtt upp í Rás2 famljuna og hann sigur, at nú ber til hjá 95% av Føroya fólki at hoyra Rás2.

Enn eru nakrar smábygdir eftir og enn er óvíst, nær tær eisini verða knýttar upp í sendinetið.

- Tað er ómetaliga dýrt at røkka teimum seinastu plássunum og tí fara vit at vita um tað almenna ikki eisini sær tað sum eina uppgávu, at tryggja, at øll hoyra Rás2 og tískil vil stuðla eini ætlan, sum knýtir seinastu bygdirnar upp í.

- Tað er eitt fólkakrav, at hoyra Rás2 og tað almenna átti eisini at sæð tað sum sína uppgávu at stuðla uppundir, at øll fingu høvi at hoyra Rásina - serliga nú ein kanning á Portalinum vísir, at fleiri fólk lurta eftir Rás2 enn tað lurta eftir almenna Kringvarpinum, sigur Jonhard Hammer.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*